# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Miðsummargrill yviri við Strond



TÍÐINDASKRIV

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør skipar leygardagin 23. juni fyri „Miðsummargrill" uttan fyri felagshølini yviri við Strond í Havn. Tiltakið byrjar kl. 17.00 og er fyri limir felagsins við húski.

Eirikur Ó. Simonsen, formaður í felagnum, sigur at hann vónar at undirtøkan verður góð, og at hetta verður eitt afturvendandi tiltak, ið kann verða við til at samansjóða limirnar felagsins.

# Hátíðarløta fyri Regini Dahl

Fyrr í ár, tann 29. mars, andaðist Regin Dahl í Keypmannahavn. Regin Dahl var sonur Jákup Dahl, próst. Mamma hansara, Maria, var dóttir tann gitna Bakar Hansen, sum íbirti eitt nútíðar tónleikalív í Føroyum.

Regin Dahl virkaði í mong ár sum bókmentaligur konsulentur hjá forlagnum Gyldendal. Men hann var fyrst og fremst yrkjari, og nú hann andaðist, hevði hann latið úr hondum 12 yrkingasøvn umframt týðingar, greinasavn, hittinorð og plátur við upplestri og sangi. Millum sínar landsmenn var Regin helst uppaftur betur kendur sum tónaskald og vísusangari. Longu stutt eftir at Útvarp Føroya var komið, var hansara eyðkenda rødd at hoyra har.



Serliga kend gjørdust hansara løg, tá ið Hans Andriasar Sjómansrímur í 1983 komu á plátu. Í 2005 kom út eitt heildarsavn við 25 fløgum, har Regin syngur síni egnu løg og sjálvur hevur fylgispælið.

Í morgin, fríggjadagin tann 22. juni, verður hátíðarløta í Havnar Kirkju, dómkirkjuni, í sambandi við, at urnan við Regini Dahl leygardagin verður jarðsett í Nýggja Kirkjugarði í Havn. Umframt at felagssálmar verða sungnir, fer Tórshavnar Manskór at syngja, og Jakob Illeborg, abbasonur Regins, fer somuleiðis at syngja ein sálm eftir Grundtvig við lagi eftir Regin Dahl. Marjun Bæk prestur sigur nøkur orð og hevur bønarhald. Hátíðarløtan verður kl. 16.00.

## Jóansøkuframsýningin

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 22. juni kl. 17 letur jóansøkuframsýningin upp í "Gallarí Oyggin" á Tvøroyri.

Tey sum sýna fram eru: Rannvá Mortensen og Palle Julsgart við málningum og Preben Boye við skulpturum.

Umframt tað eru eisini nakrir politikarar úr Suðuroy ella við tilknýti til Suðuroy, sum sýna fram oljumálningar. Leygarkvøldið kl. 21 verða hesir málningar seldir á uppboðssølu.

Eisini lesur Jóannes Nielsen upp yrkingar og Guðrun Sólja Jacobsen syngur nakar sangir.

# Annar millumskúlaflokkur í 1940

## – Færøernes Mellem- og Realskole



Mynd í sambandi við framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir, sum verður um ólavsøkumundið í Kommunuskúlanum.

Á hesi myndini er annar millumskúlaflokkur í 1940.

Aftasta rað f.v.: Hans Vang Hansen, Vagn Erik Michelsen, Høgni Mohr, Olávus Danielsen, Johan Petur Petersen og Jóannes Hansen

Miðraðið f.v.: Erik Lützen, Anna K. Poulsen, Kirstin Jensen, Hjørdis Thomsen, Nanna Djurhuus, Judith Jacobsen og Edith Simonsen

Fremst f.v.: Birgit Hilbert, Turid Dahl, Kristina Sloan, Sólrun Árting, Anna Evensen, Anna P. Poulsen og Brynhild Eysturlíð

Hóast tíðarfreistin er farin at lata myndir inn til framsýningina, heitir Jórunn á tey sum eiga millum- og realskúlamyndir um at lata tær inn til framsýningina.

Adressan er: Jórunn Dánialsdóttir. Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024 /226024 ella 0045 30 69 77 92. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

*Myndaeigari: Anna Christiansen*